## DAGSINS MEINING

# Samanlegging

Landsstýrismaðurin í mentamálum gjørdi nú um dagarnar av, at loftmiðlarnir báðir SvF og ÚF skulu leggja saman til ein stovn. Hetta er eitt afturvendandi mál. Frá politiskari síðu hevur verið sagt, at tað er greiðari og bíligari so fáment vit eru at hava eina og somu umsiting av stovnunum. Kortini hevur ongantíð verið full semja um at taka slíka avgerð - til nú, tá landsstýrismaðurin bráddliga uttan at nakar væntaði tað gjørdi av, at stovnarnir frá 1.januar 2005 skulu vera ein stovnur.

Hetta hevur sjálvandi elvt til bæði kjak og ónøgd, ikki minst millum starvsfólkini í almennu loftmiðlunum, sum kenna tað so, at tey eru tikin á bóli, nú einki orðaskifti ella fyrireiking hevur verið frammanundan avgerðini. Hóast avgerðin er tikin, so er rætt at spyrja, hví hetta skuldi fram í slíkum skundi. Og hevði tað ikki verið best og rættast, at øll skipanin varð kunnað og tikin við uppá ráð frammanundan, sjálvt um avgerðin at leggja saman var politisk og endalig! Sum skilst eru tað afturvendandi ótryggu viðurskiftini í SvF, sum hava fingið landsstýrismannin at taka avgerðina. Endaliga skumpið var møguliga avgerðin hjá SvF-stjóranum at senda DR sjónvarp beinleiðis.

Starvsfólkini í báðum stovnunum eru alt annað enn nøgd við mannagongdina í málinum, og tað er væl skiljandi. Hetta er jú eisini teirra arbeiðspláss og teirra framtíð. Hóast avgerðin er politisk, so átti landsstýrismaðurin kortini at havt kunnað betri og fyrr og tikið stovnarnar báðar við í viðgerðina. Og hevur alt landsstýrið veruliga viljað hesa broyting, hví var hon tá ikki partur av samgonguskjalinum! Tá høvdu bæði starvsfólk og onnur havt møguleika til at fyrireika seg til hesa broyting og samtíðis kunnað sett hol á kjakið um fyrimunir og vansar, sum so aftur skuldi gjørt, at man fekk tað allarbesta burtur úr. Tá varð spælt við opnum kortum. Og ikki sum nú, har ónøgdin og frustratiónin valdar og harvið kann forða fyri tí bestu loysnini fyri allar partar.

Landsstýrismaðurin er nýggjur og óroyndur. Hann er annars ein varin maður og plagar at ansa væl eftir ikki at taka munnin ov fullan. Harfyri eigur hann at gera alt fyri at seta seg inn í eitt slíkt álvarsmál sum hetta, áðrenn hann meldar út so týðandi avgerð. Tíverri er hetta ikki fyrstu ferð, at landsstýrimaðurin meldar út við frustrerandi úttalilsum. Tað gjørdi hann eitt nú á ráðstevnu fyri fjølmiðlafólk herfyri, tá hann um torføru umstøðurnar hjá skrivandi miðlunum segði, at tað var bara at koma út færri dagar, so skuldi tað nokk laga seg. Ein sera óheppin og illa umhugsað útmelding frá einum mentamálaráðharra sæð frá einum blaðsjónarhorni.

Annars eigur landsstýrismaðurin rós uppiborið fyri, at Musikskúlin fær sínar pengar, tá avtornar. Vónandi fer hann nú at brúka komandi tíð til at finna skilabestu loysnirnar við samanlegging av loftmiðlunum eitt nú við at taka allar partar við í viðgerðina.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nýggj skúlalæknaskipan – Aftur ein dýrur og óneyðugur stovnur í Havn?

**Signar P. Dam**
*skúlalækni*

Dagfest 30. januar 2003 kom bræv frá landsstýrismanni, Bill Justinussen, til okkum kommunulæknar um áðrenn 13. februar, (t.v.s. 10 daga freist eftir móttøkuna av brævinum!) at gera okkara viðmerkingar til landsstýrismansins lógaruppskot til nýggja skúlalæknaskipan.

Bert henda stutta freistin segði so mikið, at landsstýrismaðurin ongantíð hevði ætlað so mikið sum at skeitt til viðmerkingarnar frá okkum sakkønu, men ætlaði at gjøgnumføra eitt lógaruppskot, sum var skræddaraseymað til ávísan politisk áhugaðan kommunulækna.

Loyvi mær at seta hesir tríggir spurningar til fyrrverandi landsstýrismannin:

Nær hevur kommunulæknafelagið sum felag viðgjørt hetta lógaruppskotið og hvør var niðurstøðan?

Hvussu nógv svar fekk landsstýrismaðurin frá kommunulæknunum?

Hvussu nógvir vóru fyri og hvussu nógvir vóru ímóti?

Loyvi mær niðanfyri at endurgeva hvat undirritaði svaraði (10 daga freist!)

<u>Til Familju og Heilsumálaráðið</u>
Ref.J.nr. 0.15-2200840/5
Uppskot til løgtingslóg um nýggja skúlalæknaskipan.

**Viðmerkingar til omanfyrinevnda uppskot.**

Undirritaði hevur verið skúlalækni í Suðuroyar Norðara Læknadømi í 25 ár, og hevur verið á kravda skúlalæknaskeiði í Danmark.

Kenni sostatt núverandi skipan og haldi ikki at skipanin krevur broytingar, men eigur at verða avtikin. –Ístaðin eigur skúlasjúkrasystraskipanin at verða útbygd soleiðis, at allar kanningar hjá lækna verða sokallaðar tørvkanningar, sum verða gjørdar hjá kommunulækna eftir tilvísing frá skúlasjúkrasystur.

Mínar royndir gjøgnum øll hesi árini eru, at tað er sera lítið av skúlalæknaarbeiðinum sum ein útbúgvin skúlasjúkrasystir ikki kann gera. – Um barnið er regluliga kannað hjá kommunulækna gjøgnum tær 8 barnakanningar, sum standa foreldrunum í boðið, so eigur ein skúlalækni bert í heilt sjáldsomum førum at finna psykist ella likamlig brek, sum ikki eru staðfest áðrenn av kommunulæknanum, og soleiðis eru eisini mínar royndir gjøgnum árini.

Skúlasjúkrasysturin ger í dag funktiónskanningar (sansa- og rørslukanningar) og tað er ongin orsøk at halda, at ein lækni ger tað betur.

Sjón og hoyrn verður kannað av skúlasjúkrasystrini og tær kunnu eisini lættliga læra at kanna rygg og út-limir.

Hvat viðvíkur sjúkufyribyrgjan og heilsufremjan, so er eingin betur skikkaður at røkja hetta enn skúlasjúkrasysturin, sum hevur dagligt samband við børnini og aloftast teirra álit í nógv størri mun enn skúlalæknin, sum er teimum meira fremmandur, fyri - ikki at tosa um ein teimum púra ókendur persónur, sum ein landsskúlalækni fer at vera.

Hetta sum eg nevni omanfyri, verður praktiserað í hesum skúlalæknaøkinum við at skúlasjúkrasysturin tosar við hvønn einstakan næming um royking, alkohol, matvanar, kynslívið, AIDS og mangt annað. – Haldi tað er ein stórur fyrimunur at skúlasjúkrasysturin ger hetta, tí sum nevnt er hennara samband við næmingin nógv tættari enn skúlalæknans.

Skúlasjúkrasysturin kann (og tað verður eisini gjørt her) skipa fyri størri felags tiltøkum av sjúkufyribyrgjandi og heilsufremjandi slag. Til dømis temadagar um happing, etingaólag o.a. Samanumtikið: Avtakið skúlalæknaskipanina og víðkið skúlasjúkrasystraskipanina!

(Undirskr. Signar P. Dam, skúlalækni).

**<u>Eftirskrift:</u>**
Skúlalæknaskipanin varð sett í verk allarhelst einaferð í 30.unum, tá ið barnaríkar familjur ikki høvdu ráð til at hava tilknýti til fastan kommunulækna, tí sjúkrakassaskipanin var ikki so væl útbygd sum í dag, og eisini tí fólk vóru rædd fyri at fáa staðfest álvarsamar sjúkur sum t.d. tuberkulosu.

Í dag verða so gott sum øll børn í Føroyum røkt av serlækna í almennari heilsu og hava tískil ikki brúk fyri nøkrum »pseudospesialisti« í skúlabarnasjúkum.

Fari neyvan skeivur um ikki hesin stovnur eftir stuttari tíð er bólgnaður upp soleiðis, at vit hava ein landsskúlalækna, ein landsskúla-hjálparlækna, einir tveir skrivarar og einar tvær skúlasjúksasystrar.

Hesi skulu so ferðast landið runt fyri dýran dagpening til onga nyttu.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Gaarder slapp ongantíð framat

**Saknur var í strukturi, einum reyðum trái og nøkrum niðurstøðum í Norðurlandahúsinum sunnudagin seinnapartin, tá verturin Ivan Niclassen hevði samrøðu við mæta norska rithøvundin Jostein Gaarder**

LISTASTEVNAN 2004

*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*Við kontantari stýring og øktum tamarhaldið frá vertinum Ivani Niclassen høgrumegin hevði samrøðan við mæta norska rithøvundin Jostein Gaarder ikki verið eitt vónbrot í Norðurlandahúsinum sunnudagin. Men tiltakið var eitt vónbrot, m.a. tí tað rúmaði alt ov nógvar spurningar og evni við tí úrsliti, at norski rithøvundurin ongantíð slapp í dýpdina*

*Mynd: Jan Müller*

Sunnudagin klokkan 16 høvdu føroyingar høvið at hoyra gitna norska rithøvundin, 52 ára gamla Jostein Gaarder, í Norðurlandahúsinum undir listastevnuni 2004.

Tiltakið í Norðurlandahúsinum tók í stóran mun útgangsstøði í verkunum hjá Gaarder, men prátið og spurningar sirkuleraðu eisini kring persónin sjálvan og hansara sjónarmið um alt ov nógv evni.

### Yvirfladiskt

Lat tað vera sagt beinanvegin. Jostein Gaarder er og verður eitt bergtakandi menniskja. Við sínum beinraknu lýsingum forførdi hann áhoyrararnar, og um maðurin fær frítt spæl, er hann ein sannur meistari.

Stóri trupulleikin var bert, at Jostein Gaarder als ikki fekk loyvið at oysa av sínum sálardýpi undir tiltakinum í Norðurlandahúsinum sunnudagin.

Tiltakið varð eyðkent av vantandi dýpd, og tá fólk um hálvgum seks tíðina leitaðu sær út aftur í forhøllina eftir tiltakið, var saknur í einum reyðum, samanhangandi trái. Á henda hátt gjørdist tiltakið ov strukturleyst, og tað var spell.

Orsøkirnar vóru fleiri. Lutvíst skuldi verturin Ivan Niclassen verið meiri kontantur í síni stýring. Lutvíst vóru nakrir av spurningunum frá áhoyrarunum í so malplaseraðir uttan »situatiónsfornemmilsi«, sum setti bæði Ivan og Gaarder í eina trupla støðu. Og lutvíst er tað ein trupul uppgáva hjá vertinum yvirhøvur at stýra einum rithøvundi, sum milt sagt er ein »snakkimaskina«, og sum í ein mun hevur lyndi til sjálvur at flyta fokus. Men sera mótsigandi er hesin eginleiki samstundis júst eitt positivt eyðkenni við Gaarder.

Ivan Niclassen upplýsti áhoyrarunum at byrja við, at hann hevði fyrireikað 30 spurningar, men tá avtornaði vóru kanska ein triðingur av spurningunum nýttir.

Úrslitið eftir tiltakið var, at Gaarder, vertur og áhoyrarar høvdu skoytað á yvirflatuni á eini ørgrynnu av torførum heimspekiligum evnum uttan at fullfíggjað kjakið við dýpd, niðurstøðum og samanumtøkum.

Tað vóru stutt sagt ikki stundir til fullfíggjaða viðgerð av teimum evnum, hol varð sett á, og onkuntíð tóktist mær synd í Gaarder, sum í eini handavending skuldi svara spurningum um fundamentalismu, humanismu, Gud, alheimin, deyðan, náttúruna, seg sjálvan, Jesus, Augustin, tilvild, bøkur sínar o.s.fr. Evni, sum eru heil serfak í sær sjálvum. Á svarum hansara hoyrdust eisini allar tær hugsanir og spekulatiónir, sum lógu í bakgrundini og skríggjaðu eftir at verða sagdar, men sum sagt loyvdu umstøðurnar ikki Gaarder veruliga at sláa seg leysan við neyvari útgreiningum.

Við øktari stýring og øktum tamarhaldið frá vertinum skuldi tiltakið havt rúmað færri spurningum og evnum, og við hesi kvantitativu avmarking hevði áhoyarin harafturímóti fingið meiri góðsku og ikki minst samanhang.

### Undirhaldandi heimspeki

Men hóast umstøður og fortreytir ikki vóru optimalar, fingu áhoyrarar í øllum førum okkurt fyri pengingin. Jostein Gaarder er ikki hvør sum helst, og fáur kann rúnarbinda sum hann. Hansara títta, syngjandi norska mál fekk skjótt vald á áhoyrarunum, og merkti ein, at Jostein veruliga gongur høgt upp í tað, hann hevur at bera fram. Ein fær kensluna av, at maðurin er ein livandi mótsøgn til líkasæluna.

Spurdur, hví hann fekk altjóða gjøgnumbrot við júst Sofies Verden, kastaði hann ljós á stílin.

– Eg kundi gott havt byrjað bókina við, at »menniskjan hevur frá tíðarinnar morgni sett sær sjálvum djúpar, eksistentiellar spurningar« skapaði Gaarder sær við tungari, monotonari og hátíðarligari rødd, og láturin fór ígjøgnum salin, áðrenn Gaarder skifti yvir aftur í normala rødd.

– Í staðin valdi eg at byrja bókina við, at »Sofie Amundsen var á veg heim úr skúla«, segði hann og vísti við hesum á, at hann royndi at gera heimspekina lættari, meiri undirhaldandi og harvið meiri innbjóðandi til ungdómin. Hesin stílur er helst orsøkin til hansara stóra gjøgnumbrot.

### Fundamentalisma

Ein rúgva av evnum vóru uppi at venda, sum Gaarder hugleiddi um við støði í spurningum frá áhoyrarum og vertinum, men sum sagt var talan um kvantitet fram um kvalitet.

Gaarder viðurkendi seg sjálvan sum romantikara og melankolikara, og við útgangsstøði í nýggjastu bók hansara Maya kom hann enn einaferð inn á, at lívið altso er ov stutt fyri hann. Í bókini Maya sita tveir menn á eini oyggj, og við at tendra ein magiskan tendrara kunnu teir velja, um teir vilja hava ævigt lív ella ikki.

– Eg havi umgangandi tendrað tendraran og ognað mær ævigt lív, konstateraði Gaarder uttan at blunka. Men samstundis spurdi hann, um man kann loyva sær at nokta at luttaka, bert tí einum ikki hóvar reglurnar? Svar hansara var nei. Lívið skal hóast avmarkingarnar livast.

Við støði í altjóða kjakinum um islamiska fundamentalismu spurdi ein áhoyrari, um tað ikki eisini finst ein kristin fundamentalisma, og hvønn hugburð Gaarder hevur til hetta rák. Mótvegis tí, fleiri væntaðu, helt Gaarder eftir spurningin eina verjurøðu fyri Jesus, samstundis sum hann langaði út eftir víðgongdu fatanini, sum er grundarlagið undir kristnari fundamentalismu.

– Kristindómurin er í síni náttúru ikki fundamentalistiskur, og Jesus var eftir mínum tykki ein stórur humanistur, sló Gaarder fast. Hann legði afturat, at tey, sum rópa harðast um islamiska fundamentalismu, oftast sjálv eru fundamentalistar.

Seinastu løtuna varð ljós kastað á stríð Gaarders fyri einum betri umhvørvi, og so var liðugt í Norðurlandahúsinum.

Hóast nøkur gullkorn frá meistaranum hevði eg og møguliga onnur við eina heldur tóma kenslu eftir tiltakið. Hví kom so lítið burturúr so nógvum? Orsøkirnar eru fleiri, men skal slíkt ikki endurtakast, er neyðugt at taka um rótina á trupulleikanum og endurskoða grundleggjandi konseptið við samrøðu og spurningum frá áhoyrarunum. Í Norðurlandahúsinum var í øllum førum saknur í eini meiri diktatoriskari, harðari hond at stýra.